VIÐMERKINGAR

# Derfor skal I elske den fremmede

**Af Bjarne Nederby Jessen**

Såvel GT som NT er fyldt med opfordringer til at elske næsten. Du skal elske din næste, som er sådan én, som du selv er. Begrebet bliver flere steder konkretiseret. I 5. Mos.23:16-17 fremgår det, at man skal tage godt imod en bortløben slave, der søger tilflugt. I 5. Mos. 10:17-19 står det klart, at vi skal tage godt imod de fremmede: „For Herren Jeres Gud er gudernes Gud og herrernes Herre, den vældige og den frygtindgydende Gud, som ikke er partisk og ikke lader sig bestikke, men som skaffer den faderløse og enken ret, og som elsker den fremmede og giver ham brød og klæder. Derfor skal I elske den fremmede, I var jo selv fremmede i Egypten." I 3. Mos. 19:33 f får vi at vide, at „når en fremmed bor som gæst i jeres land, må I ikke udnytte ham… den fremmede skal være som en af landets egne, og du skal elske ham som dig selv." Skriften er klar i sine udtalelser om de fremmede, flygtninge og indvandrere.

Men hvordan ser det ud i Danmark med at leve op til skriftens ord? Vi har et politisk parti, der har gjort det til sin hovedopgave at bekæmpe de fremmede – og desværre ser vi, at en del kristne støtter dem på grund af en udbredt muslimer-forskrækkelse skabt af en presse, der kaster sig over de dårlige historier, som der er for mange af, og undlader at skrive om de positive historier, som der er mange flere af. Pressen har givet os en fornemmelse af, at alle flygtninge og indvandrere er muslimer, og at de vil os det ondt. Men sandheden er, at 1/3 af alle flygtninge er kristne, at en del af dem kommer i Den Lutherske Kirke, at en større del kommer i frikirkerne, at en endnu større del har dannet migrantkirker, og at en rest ikke har fundet sig til rette i nogen kirke. Sandheden er også, at en stor del af muslimerne er lige så passive og tandløse, som en stor del af de såkaldte firhjulskristne, der kun kommer kørende til kirke til dåb, konfirmation, bryllup og begravelse, og derudover ikke har noget egentligt med kirken og troen at gøre.

Derfor harmes jeg, når kristne vender de fremmede ryggen og ikke lever op til skriftens ord. Jeg harmes, når det danske samfund udviser mennesker på et helt urimeligt grundlag. Vi har hørt om de to syriske søstre, der er født og opvokset i Saudi-Arabien, hvor de blev kristne, inden de kom til Danmark, og som blev udvist til Syrien, hvor de aldrig har været, men hvor deres fundamentalistisk islamiske fars familie bor. Ingen har hørt fra dem siden.

Måske lever de ikke mere. Er det tilfældet, har Danmark gjort sig skyldig i at sende to unge velintegrerede kvinder i døden. Det er ukristeligt. Vi har hørt om en velintegreret armensk familie, der er blevet udvist. Flere af børnene kender ikke det land, de udvises til. En ung araber, John, der er blevet kristen og er døbt, står over for udvisning. Hans far er imam, og efter udvisningen risikerer John livet. I øjeblikket gøres der meget for at hjælpe ham, men vil anstrengelserne være forgæves? Dansk flygtningepolitik tager ikke individuelle hensyn, og vi gør os skyldige i de samme „forbrydelser", som vi netop har undskyldt at have gjort over for jøder under 2. verdenskrig, der blev udvist til Tyskland.

Jeg er rystet over, at et såkaldt kristent land kan handle sådan, og at nogle kristne endda bifalder det! Når det er sagt, skal det også siges, at vi blandt os har islamiske ekstremister, og det skal vi være vågne overfor og handle på. Vi skal også være opmærksomme på de indvandrere/-flygtninge, der gang på gang begår kriminalitet, og som ikke udvises. Samfundet må skride ind over for dem.

Vi skal gå mere aktivt ind i integrationsprocessen, og her bør kirkerne arbejde aktivt med. En del gør det allerede, men vi skal/bør alle være med, for vi har et ansvar for de fremmede iblandt os.

## Brek á postskipanini

Av tekniskum ávum hava trupulleikar verið við teldupostinum hjá Sosialinum týs- og mikudagin.

Tað kann tí vera komið fyri, at teldupostar, sum eru sendir okkum hesar dagar als ikki eru komnir fram.

Tey, ið hava sent okkum teldupost hetta tíðarskeið, verða vinarliga biðin um at senda hesar einaferð afturat.

**Sosialurin**

## Kommunu-diktatur-strukturin

**Símun A. Klein**

Sum eg mangan áður havi nevnt, so eru Føroyar at rokna sum EIN donsk kommuna, undirstrikað av kensum donskum løgfrøðingum innan statsrætt v.m.

Harvið eru Føroyar eitt eindømi um í allari verðini, at tær eru ein kommuna, ið e lutað sundur í kommunur.

Í Dimmu nr. 107, 8. juni 2005, gevur Jógvan við Keldu til kennar, at í seinasta lagi ár 2009 skulu Føroyar minkast niður í 7 til 9 kommunur, og hann sigur m.a. víðari í greinini undir heimatíðindum, at eru avtalur ikki gjørdar millum kommunurnar um samanlegging, tá ið eitt ár er eftir av kommunuskeiðnum, *so verður helst neyðugt at leggja kommunurnar saman við lóg!*

Oddagrein í sama blaði veit eisini at siga, at tó eru eisini kommunur, ið ikki eru áhugaðar í at leggja saman og vilja tí heldur varðveita skipanina sum hon er... Leggja kommunur ikki saman við fríum vilja, so vera tær lagdar saman við lóg áðrenn ár 2009!

Her, sum so mangan í Føroya søgu, síggja vit hvussu hitt føroyska demokratiið gevur seg til kennar, tá tað virkar optimalt.

Hesin ætlaði framherðarhátturin hjá landsstýrinum er at samanlíkna við gifta mannin, ið ikki fær sín vilja við konu síni, og tískil er bert eini vegur til tess at røkka málið: **At neyðtaka konuna!**

Tað er gott at teir persónar og tær kreftir stíga fram alment og harvið geva til kennar, at einaræðisveldi er bara sakin, men brennandi spurningurin er bert, hvarí hesir persónar ið fleiri ferðir um vikuna við Bíbliuni undir arminum ella í hondini (øllum førum ikki í hjartanum) ganga trúfast hvør í sínum lagi á møti í hvør sínari syna-gogu. At hvar í tí kristnu trúnni teir fáa hendan frælsisandan frá, hetta, **AT TVINGA OG KÚGA SÍN VILJA ÍGJØGNUM?**

Tað skal ein ávísur frekleiki til at burturforklára Gal. 5.1, Kol. 2, 8 og 1. Kor. 7, 23.

Tey eru alt ov mong okkara millum, ið ganga og trúgva tí, at tey kunnu ogna sær himmalin í báðum støðum tvs. her á foldini og handan grøv, men stjørnmálafrøðin úr erva er annarleiðis hátta enn tær heimagjørdu bumburnar innan løgting og landsstýri.

Danmark kravdi demokrati innført í 1848 og fekk tað ígjøgnum - hvat við at Føroyar eisini koma inn undir demokratiska stýrisskipan tá nú Føroyar sigast at hoyra undir Danmark, tó uttan at demokrati loyvist at búleikast á klettunum??

Her ruggar einki rætt tit blindu farisearar!

# Jóansøkuhugni í Funningsfirði



*Væl av fólkið hevði leitað sær til Funningsfjørð, tá jóansøkuhugni var á skránni seinasta fríggjadag*

Fríggjakvøldið 24. juni varð skipað fyri jóansøkubáli í Funningsfirði. Bygdanevndin hevði sett upp grillir, borð og pall við bátahylin. Veðrið var av tí allar besta og bæði børn og vaksin høvdu leitað sær til Funningsfjarðar. Fólk nýttu høvið at grilla á stóru grillunum, ið vóru settar upp til endamálið.

Tiltakið byrjaði við at borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, helt eina røðu, har hann m.a. vónaði at hetta tiltak fór at vera afturvendandi, og hann gleddist um at fólk úr hinum bygdunum í Kommununi eisini vóru møtt til jóansøkubálið.

Eftir røðuna var felagssangur, har varðaborgarstjórin, Kári P. Højgaard, sang fyri. Seinni var bryggjudansur, har Bjartur Skipanes, Jens Marni Hansen og Bjørn Djurhuus spældu. Eisini vóru dansispøl og føroyskur dansur á skránni.

Tiltakið endaði umleið klokkan 3 um náttina, tá bæði ung og eldri fóru væl nøgd til húsa við ætlanum um at koma aftur til Jóansøkubál í Funningsfirði komandi ár.

## Gongutúrur Tvøroyri - Fámjin

**Nú skipa kunningarstovurnar í Suðuroynni aftur fyri gongutúrum millum bygdirnar hvønn leygardag**

GONGUTÚRUR
*tíðindaskriv*

Komandi leygardag 2. juli verður gingið av Tvøroyri og til Fámjins. Bussur koyrir av Kunningarstovuni í Vági (býráðsskrivstovan) kl. 10:00 og av Kunningarstovuni á Tvøroyri (býráðsskrivstovan) kl. 10:30. Koyrt verður til gomlu kolaminurnar í Rangabotni, har túrurin byrjar. Gingið verður framvið hægsta fjallið í Suðuroynni, Gluggarnir, ið er 610 m. høgt, um Oyrnaskarð og oman til vakra Kirkjuvatn. Við á túrinum verður staðkent heimildarfólk.

Eftir loknan túr verður koyrt við bussi til kunningarstovurnar, har ið tit hava latið bilin standa eftir.

Bindandi tilmelding fer fram á Kunningarstovuni í Vági tlf. 37 43 42 ella á Kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 37 24 80, í seinasta lagið fríggjadagin kl. 16:00.

Havið heit og góð klæði, góðar skógvar, matpakka og okkurt drekkandi við. Eitt gott hugskot er eisini at hava ein kikara og kort yvir økið við, soleiðis at fylgjast kann við har gingið verður.